

Tey ungu leita eftir olju á telduni, nakað, sum Simprentis skipar fyri í Føroyum og í nógvum øðrum londum.

# Royndur oljumaður: Oljuinntøkur mugu ikki gerast koddi hjá ungdóminum

**Jan Müller**

25.01.2014 - 19:28

Oljan.fo

“Eg eri vísur í, at vit fara at finna olju og gass í Føroyum. Hetta fer at hava stóran týdning fyri samfelagið, men tað er av alstórum týdningi, at vit gera okkum klár til hesa framtíð,” sigur klaksvíkingurin Robert Gardar, sum hevur arbeitt í útlendsku oljuvinnuni í mong ár.

Hann er bara ein av teimum mongu føroyingunum í hesi vinnu, sum fegin vil koma heim at arbeiða, um oljan verður funnin.

Men við sínum drúgvu royndum í oljuvinnuni sær hann eisini fyri sær tær stóru avbjóðingar, sum Føroyar sum land standa fyri, koma stórar inntøkur frá oljuvinnuni bráddliga inn í landið.

“Landið er ikki stórt, fólkatalið er lítið, so tað verður ein avbjóðing eisini, at onnur størv í Føroyum ikki drukna í kravinum um at fáa fólk til oljuvinnuna.

Vit mugu læra av royndunum og her ikki minst mistøkunum hjá øðrum og havi eg serliga eitt í tonkunum, nevniligaat vit ikki brúka inntøkurnar sum ein kodda hjá ungdóminum, men seta krøv til at tey fáa sær eina útbúgving og verða ein virkin partur av at menna samfelagið sum heild,” sigur Robert Gardar.